# HEILSANIR



**Hey Elly og Fredrik**
Her eru tit so vist forlovaði og nú hava tit diamantbrúðleyp 26. nov. Og sum vit elska tykkum.
**Heilsan tey 5 børnini, 15 abbabørnini og 13 langommu- og - abbabørnini**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegi mínum 2. okt. 2005.
**Heilsan Tróndur Tummasarson, Tvøroyri**



**Góða Oddvør**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 19. nov.
**Heilsan mamma, babba og Bjørt**



**Góða Oddvør**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 19. nov.
**Heilsan omman, abbin og Martin**

Sosialurin
## Heilsanir
kr. 30,-

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán ☐ Týs ☐ Mik ☐ Hós ☐ Vikuskifti

Tekstur:_______________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:_______________________________________
Bústaður:_______________________________________
Bygd/býur:_______________________ Tlf.:___________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>**Heilsanir**<<




# Sansir søkja forritara
## at byrja sum skjótast

Ert tú forritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær. Sansir eru eitt samskiftisvirki, sum millum annað veitir fjølbroyttar loysnir innan internet og kunningartøkni.

Í løtuni starvast 20 fólk á Sansum; av teimum eru fimm knýtt at internetdeildini. Vit nýta okkara egnu CMS skipan til at skapa dynamiskar loysnir, sum verða skraddaraseymaðar til virkir og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving ella hevur hollar royndir á økinum. Tú hevur kunnleika til ASP, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til ASP.NET.

Tú fært góðar møguleikar at menna teg – bæði fakliga og menniskjaliga. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug til at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.
Send umsókn við prógvum og møguligum viðmælum til:

Sansir
Att: Bárður Viberg Dam
Dvørgastígur 7
Postboks 1099
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. november 2005.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til Bárð á bardur@sansir.fo ella ringja 221 405.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo